# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Jógvan Adolf Johannesen 70 ár



Í dag, hósdagin 20. juli, verður Jógvan Adolf Johannesen í Dali 70 ár. Hann var løgtingsmaður í tíggju ár, og hann var í mong ár millum tey fremstu í vinnulívinum í Sandoy.

Jógvan verður hann nevndur í Dali, og uttanbýggja verður hann róptur Jógvan Adolf. Foreldrini vóru Frida og Sofus Johannesen, sum bæði vóru úr Dali. Jógvan er elstur, og hann eigur tveir brøður – Vitus í Dali og Hans Marius í Havnini.

Sum unglingi sigldi Jógvan við føroyskum, íslendskum og norskum fiskiskipum. Veturin 1957-58 var hann næmingur á Føroya Fólkaháskúla, og í 1962 leyk hann prógv á Føroya Læraraskúla. 1962-68 var hann lærari í Rituvík, í 1968 varð hann lærari í Skopun, har hann í 1970 gjørdist fyrsti lærari. Í tí starvinum sat hann, inntil hann 1. august í 1997 legði lærarastarvið frá sær.

1967-68 var hann á árs-skeiði á Fróðskaparsetri Føroya í føroyskum máli og bókmentum, og hann var á fleiri skeiðum fyri at nema sær kunnleika at undirvísa seinmentum børnum.

Í august 1972 keypti Jógvan saman við øðrum danska 50 tons trolbátin Dalbúgvan úr Esbjerg. Ein annar av ánarunum, Ólavur í Klæmintsstovu í Dali, førdi bátin, sum teir løgdu nógv fyri við, og tað hilnaðist væl. Har vóru raskir menn uppií bæði á sjógvi og landi, og Jógvan var nærlagdur og altíð tøkur reiðari.

Í 1985 keyptu teir eitt par úr Vestmanna. Trolararnir vórðu nevndir Hádegisklettur og Stígarklettur. Synirnir hjá Ólavi í Klæmintsstovu vóru tá komnir til mans og vóru við til at føra bátarnar. Tað lá væl fyri, og trolararnir høvdu stóran týdning fyri flakavirkini í Sandoy.

Gongdin var tann sama, tá ið teir síðst í áttati árunum høvdu skift hesar báðar trolararnar út við Stígarklett og Hádegisklett, sum teir lótu byggja á Tórshavnar Skipasmiðju. Teir áttu eisini eitt skifti rækjutrolaran Sævarklett.

Tá ið kreppan av álvara gjørdi um seg, fóru skipini úr Sandoy. Men Jógvan gavst ikki á hondum. Vinnuloysið var stórt í Sandoy, og fólkatalið minkaði. Tí galt tað nógv um hjá Jógvani at fáa vinnuvirksemið upp aftur at standa. Hann var drívmegin og fekk góðar menn afturat sær. Tá ið alt lá í skeljasorði, keyptu teir í 1995 Eysturbúgvan, sum kom úr Vestmanna, har hann hevði itið Gullberg. Skjótt eftir at teir høvdu keypt Eysturbúgvan, var aftur fiskur at fáa, og tað royndist væl hjá teimum.

Nú eru nøkur ár síðani, at Jógvan gavst við reiðaravirkseminum.

Í 1971 gjørdist Jógvan skrivari í Skopunar bygdarráði. Tað starvið røkti hann inntil í 1992.

Í 1988 varð Jógvan valdur á ting fyri Javnaðarflokkin í Sandoyar valdømi. Hann sat á tingi inntil í 1998. Jógvan umboðaði í Løgtinginum bæði Javnaðarflokkin og Sandoyar valdømi. Hann var ein av undangongumonnunum, tá ið Sandoyar ætlanin varð fingin í lag. Ætlanin var góð lopfjøl hjá teimum, sum fóru undir aftur at reka flakavirkini á Sandi og í Skopun. Saman við skipum og bátum, sum hoyra heima í oynni, hevur hetta verið vinnuliga grundarlagið undir trivnaðinum í oynni.

Jógvan hevur altíð verið áhugaður í føroyskari mentan í breiðum týdningi. Jógvan hevur verið kvæðakempa, og í tíggju ár var hann formaður í Sláið ring, landsfelagnum fyri dansifeløg.

Nú býr Jógvan í barnaheiminum í Dali, sum verður nevnt í Putlhúsinum, og sum Jógvan hevur latið seta í góðan stand.

# Hans Petur Brekkstein 80 ár



22. juli 2006 fyllir Hans Petur Brekkstein, fyrrverandi bóndi á Velbastað 80 ár. Hans Petur er sonur Jóhan og Ebbu Brekkstein. Jóhan og Ebba áttu fýra børn Hans Petur, Sunneva, Begga og Lena, tey mistu mammuna longu í 1948 tá hon doyði av sjúku. Hans Petur var elstur av syskinum og var hann tí borin til festið eftir pápan. Hans Petur fór til Íslands sum ungur at arbeiða á einum bóndagarði sum nógvir arðir ungir bóndadreingir. Hans Petur bleiv í 1952 giftur við Elin, fødd Gærdbo úr Vági. Hans Petur hevur arbeiddi nógv í havn hjá Petur Mikkelsen, sum bygdi raðhúsini í J. Patursonargøtu í 1950'unum. Harumframt kann nevnast Hotel Hafnia, Nonnuskúlin og Restorffs Bryggjarí. Somuleiðis var hann við at byggja skúlan í Runavík.

Hans Petur og vinnmaður hansara Dánjal á Mýrini (ba) á Velbastað, vóru við til at umvæla Múrin og Kirkjuna í Kirkjubø undir leiðslu av millum øðrum Sverra Dahl. Hettar arbeiðið vardi yvir fleiri miðárstíðir í 1960'unum. Hesa tíð í kirkjubø hava teir ofta práta um. Sum teir ofta tóku til, so vóru tað góðir og hugnaligir dagar í Kirkjubø, sum teir minnast aftur á við takksemi og gleði.

Hans Petur hevur eisini verið við týskum trolara til fiskiskap í Grønnlandi eitt summar seinst í 1950'unum.

Elin og Hans Petur fingu fýra børn, Ebba, Jóhan Petur, Annfinn og Bjartur, sum øll búgva á Velbastað.

Opið hús verður hjá soninum Annfinn Brekkstein, á Stórheyggi 2 millum kl. 11.00 og 15.00, og hevði tað glett familjuna at sæð vinur og kenningar støkka inn á gólvið at heilsa upp á Hans Petur.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Otto Joensen,** Kollafjørð, andaðist á landsjúkrahúsinum týsdagin, 86 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Landssjúkrahús-kapellinum fríggjadagin kl. 13, norð í kirkjugarðin í kollafirði. Sálmabókin verður nýtt.

Kistan við **Jonu Eidesgaard,** Tvøroyri, fer úr kapellinum á Suðuroyarsjúkrahúsi út í kirkjuna hósdagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrarkirkju fríggjadagin kl. 13.

Kistan við **Sveinbjørni Kvilt** fer úr Landsjúkrshúskapellinum hósdagin klokkan 18 í Skála kirkju. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Sveinbjørn kunnu lata Skála kirkju eina gávu.

**Anna Ljósstein,** ættað úr Skopun, búsitandi í Klaksvík, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikumorgunin 19. juli, 96 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi heim í Christianskirkjuna leygarkvøldið kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni sunnudagin kl. 14.00. Sungið verður úr Sálmabókini.

**Jon Gulak Jacobsen** fer til gravar úr Hvalbiar kirkju leygardagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Jon Gulak kunnu lata Amnesty eina gávu.

**Jógvan Vík** úr Haldarsvík andaðist á Landsjúkrahúsinum mándagin 17. juli, 63 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Haldarsvíkar kirkju hósdagin klokkan 14.
Tey, ið vilja minnast Jógvan Vík kunnu lata eina peningagávu til Sinnisbata. Konto í Føroya Sparikassa.

**Sveinbjørn Kvilt,** Skála, ættaður av Eiði andaðist 17. juli, 83 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum
at elskaði maður, pápi og verfaðir okkara

**Jógvan Vík**
úr Haldórsvík

andaðist 17. juli, 63 ára gamal.

*Familjunnar vegna*

**Henny, Jóhannes, Jóhan Hendrik og Eyðfríð,
Helen og Herbjørn**

*Tey, ið ynskja at minnast Jógvan við blómum ella kransum,
kunnu ístaðin flyta eina peningagávu til Sinnisbata,
konta í Føroya Sparikassa.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu,
tá kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Hans Jørgen Thomsen**
vanliga nevndur Hansmann
Tórshavn, ættaður úr Porkeri

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað og á ymiskan hátt hjálptu til.
Tøkk fyri gávur til hjartafelagið.

**Annika, Jórun, Niels, Ásgerð og Heðin**